## H1N1 ger um seg

Heilsumyndugleikarnir í Brasil kunngjørdu í gjárkvøldið, at higartil hevur Influensa A ella H1N1 kravt 899 mannalív har í landinum, og so mong mannalív hevur krímið ikki kravt nakra aðrastaðni, sigur WHO. Amerikonsku heilsumyndugleikarnir siga, at har eru 593 fólk deyð av sjúkuni, og í Argentina hevur hon kravt 512 mannalív. Í Evropa eru 137 fólk deyð, harav 76 í Bretlandi og 25 í Spania. Heimsheilsustovnurin WHO sigur, at í minsta lagi 3.200 fólk eru deyð av Influensu A ella H1N1, síðani sjúkan bleiv staðfest fyrstu ferð í Meksiko.



## Ikki fleiri rakettir

Amerikanska blaðið Wall Street Journal veit at siga, at myndugleikarnir í Washington hava gjørt av at sleppa einari ætlan um at seta fleiri verjurakettir upp í Evropa. Franska tíðindastovan AFP skrivar úr Moskva, at har eru menn væl nøgdir við avgerðina. Undanfarna stjórnin í Washington samtykti at seta verjurakettir upp í Póllandi og Kekkia. Tað fall ikki í góða jørð í Russlandi, sum hótti við at taka tilsvarandi stig. Nú hevur stjórnin hjá Barack Obama slept ætlanini, skrivar Wall Street Journal. Ein russiskir talsmaðuyr sigur við AFP, at russiska stjórnin fer nú at endurskoða málið.

# Fokus á vinnu í Eysturoy

**Fríggjadagin verður vinnuting hjá Eysturoyar vinnulívsfelag á Eiði. Millum annað verður gongdin hjá vinnuni í Eysturoy greinað**

VINNUTING

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eysturoyggin útflytur saman við Norðoyggjum umleið tveir triðingar av virðunum, sum fara av landinum. Hetta var niðurstøðan, seinast Vinnuráðgeving gjørdi eina greining av vinnulívinum í Eysturoy.

Til vinnutingið á Eiði fríggjadagin, verður aftur ein tílík greining borin fram.

- Vit fara helst at síggja nøkur av somu lutfallunum, men mann kann eisini rokna við, at kreppan hevur gjørt sína ávirkan, hóast vit onkursvegna ikki hava nóg nógv hagtøl, sigur Símun Hammer, sum verður seinastur á skránni fríggjadagin, eftir at Rodmundur Nielsen, Eyðun Gaardbo og Jens Christian Olsen eru komnir við sínum innleggum.

Símun Hammer greiðir víðari frá, at greiningarnar vanliga verða gjørdar útfrá roknskapum og tølum frá hagstovuni og so framvegis, fyri at geva eina mynd, har tað ber til at sammeta fyritøkur og økir.

- Fyritøkur kunnu til dømis nýta greiningina til at arbeiða víðari við, soleiðis at tær kunnu gerast betri, metir Símun Hammer.

### Vinnan kemur saman

Símun Hammer greiðir víðari frá, at hóast Føroyar burdu verið nóg lítlar til eitt vinnuting fyri landið, so metir hann, at tað tænir vinnulívinum í Eysturoy at koma saman av og á. Vinnuting er fýra ferðir um árið, og hesaferð verður tað í bygninginum hjá Faroe Marine Biotech á Eiði.

- Hetta vísir seg, at vera eitt mennandi forum fyri fyritøkur í Eysturoy, tí at leiðslurnar kunnu tosa um avbjóðingar og trupulleikar í fyritøkur, sigur Símun Hammer, stjóri á vinnuráðgeving.




*Símun Hammer, stjóri á Vinnuráðgeving, metir, at fyritøkur í Eysturoy kunnu mennast av at hittast av og á*

# Atlantic Petroleum betur fyri

**Nógv rumbul hevur verið kring Atlantic Petroleum, men við broyting í lánum og í leiðslu hevur felagið sambært sær sjálvum vent keðiligu gongdini**

OLJA

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*At framleiðsla er byrjað í Ettrick økinum, er ein av orsøkunum til, at Atlantic Petroleum er betri fyri í dag enn fyri einum ári síðan*

Seinasta árið hava nógv dapur tíðindi verið um Atlantic Petroleum, og so seint sum í seinastu viku kom ein greining, sum greiddi frá, at sambært roknskapinum fyri 2008 var oljufelagið í so stórum trupulleikum, at tað er vandi fyri, at tað kundi fara av knóranum.

Rættiliga skjótt kom fram, at síðan 2008 eru nógvar broytingar hendar í felagnum, sum hava við sær, at felagið í dag er nógv betri fyri.

- Vit máttu gera nakrar broytingar, og tær eru gjørdar, greiddi Wilhelm Petersen frá, eftir at felagið var sett á vandalista hjá Økonomisk Ugebrev.

### Meir framleiðsla

Eitt, sum eisini hevur gjørt seg galdandi, er at felagið er rættiliga lítið, og tí kunnu smáar broytingar merkja nógv fyri felagið.

Ein av orsøkunum til, at tað sá rímiliga svart út hjá felagnum í endanum av 2008, var at oljuframleiðsla ikki var byrjað í Ettrick-økinum. Tað er hon nú, og hetta er við at venda gongdini í felagnum.

### 200 milliónir

Ætlanin er at fáa meiri pening í felagið, soleiðis at tað er betri tryggjað. Sambært Dimmalætting í gjár, er ætlanin at fáa 200 milliónir krónur í felagið.

- Vit vita at tað er áhugi uttanlands at seta pening í felagið, og tað verður uttan iva farið tann vegin eisini, segði Wilhelm Petersen við Dimmalætting í gjár.